TING-HELLAN

# Skipaeftirlitið og Almanna- og Heilsuskúlin góðar royndir av miðspjaðing

**Leiðarin á Skipaeftirlitinum og virkandi leiðarin á Almanna- og Heilsuskúlanum á Tvøroyri síggja ikki stórvegis trupulleikar í at flyta almennar stovnar og fyrisitingar úr miðstaðarøkinum**

MIÐSPJAÐING
*Bartal Nolsøe Poulsen & Áki Bertholdsen*

Valskráirnar hjá politisku flokkunum líkjast á nógvum økjum, eisini tá ið tosað verður um miðspjaðing og útjaðarapolitikk. Flestu flokkarnir vilja menna útjaðaran, við t.d. at flyta almennar stovnar út um høvuðsstaðarøkið. Men samstundis vilja teir allir effektivisera miðfyrisitingina, og ikki er trupult at síggja eina andsøgn millum hesi bæði málini.



*Skipaeftirlitið bleiv flutt í Vágar*



*Almanna- og Heilsuskúlin kom at halda til á Tvøroyri*

Almanna- og Heilsuskúlin og Skipaeftirlitið eru tveir av landsins stovnum, sum seinastu árini eru lagdir uttanfyri Tórshavn, og vit hava tosað við leiðararnar á hesum báðum stovnunum at vita, hvussu hetta politiska eksperimentið hevur roynst.

### Mennandi fyri oynna

Jórun Petersen, sum er virkandi leiðari á Almanna- og Heilsuskúlanum á Tvøroyri sigur, at tey sum heild hava havt ótrúliga góðar royndir av at hava skúlan liggjandi uttanfyri Havnina. Bæði næmingar og leiðsla lata væl at. Jórun Petersen sigur, at ein av stóru fyrimununum við at hava skúlan liggjandi í útjaðaranum er, at allir næmingarnir búgva á staðnum.

– Um skúlin hevði ligið í miðstaðarøkinum, høvdu næmingarnir brúkt nógva tíð hvønn dag at ferðast millum skúla og bústað. Minni tíð hevði verið til heimaarbeiði, og felagslívið aftaná skúlatíð hevði heldur ikki verið tað sama. Eitt skeið á heilsuskúlanum á Tvøroyri er vanliga 8 til 10 vikur, og hóast hetta kann tykast at vera long tíð at vera vekk frá húsi og heimi, so heldur virkandi leiðarin á skúlanum á Tvøroyri ikki, at tað er nakar trupulleiki fyri næmingarnir á skúlanum. Tvøroyar kommuna hevur saman vid Suðuroyar kunningarstovu gjørt nógv fyri at útvega næmingunum bústað, og tað hevur riggað væl, heldur hon.

Jórun Petersen sær sum sagt stórar fyrimunir í at hava ein tílíkan skúla í útjaðarinum, ikki minst fyri lokalsamfelagið. – Tað er í allar mátar mennandi fyri býin og oynna, at skúlin liggur her á staðnum. Førleikakrevjandi arbeiðspláss fylgja við skúlanum, og nýtt fólk kemur til staðið, og við teimum eisini nýggjur íblástur. Politikkarar úr útjaðarunum hava fleiri ferðir gjørt vart við, at um smáu plássunum í landinum skal vera lív lagað, er neyðugt at fólk við hægri útbúgvingum hava møguleika at búsetast og arbeiða í útjaðarinum, og Jórun Petersen heldur, at við Almanna- og Heilsuskúlanum er Suðuroyggin komin eitt stig nærri at fáa hesi fólk at støðast í oynni.

### Fíggjarligir fyrimunir

Óla Hans Hammer Olsen, sum er leiðari á Skipaeftirlitinum, segði í samrøðu við Sosialin fyri stuttum frá líknandi royndum. Nú meira enn eitt ár er gingið, síðan Skipaeftirlitið varð flutt úr Tórshavn vestur í Vágarnar sigur hann, at tað hevur gingið ógvuliga væl, betri enn væntað. - Um bert fysisku karmarnir eru til staðar, skrivstovuhøli, teknisk útgerð og annað, er onki í vegin fyri, at Skipaeftirlitið liggur í Vágunum.

Tað var táverandi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen, sum í 2002 tók politisku avgerðina at flyta Skipaeftirlitið út á bygd, og hóast mong vóru ivasom um avgerðina, er leiðarin á stovninum í dag væl nøgdur.

Óla Hans Hammer Olsen sær ikki stórvegis trupulleikar vid at arbeiðsplássið hjá honum nú liggur í Miðvági, heldur tvørturímóti. Hann sigur, at hølið, sum Skipaeftirlitið hevði í Havn var 200 fermetrar, og í Miðvági er gólvvíddin einar 270 fermetrar, og hartil er leigan minni enn helvtina av tí, hon var í Havn so eisini fíggjarligir fyrimunir kunnu standast av miðspjaðingini.

Sostatt kann møguliga sigast, at mótviljin ímóti at flyta stovnar úr Havnini ikki byggir á veruligar trupulleikar, men heldur fordómar. Leiðarin á Skipaeftirlitinum dugir tó ikki at fyristilla sær, at stovnurin kundi ligið eitt nú í Suðuroynni, av tí at tað nógva av virkseminum er á meginøkinum. Hann heldur eisini, at er talan um umsiting, sum er tengd saman at øðrum partum av almennu umsitingini, kann tað gerast eitt sindur trupult at sundurskilja uppgávurnar, og at senda tær í hvør sítt herðashorn í landinum. Men Skipaeftirlitið er sum so ein stovnur, sum er rættiliga óheftur at restini av landsins umsiting, so tann trupulleikan kennir hann ikki tað stóra til. Lætt er at samskifta umvegis teldupost og telefon, og meira krevst ikki.

Vágatunnilin hevur havt við sær, at tað lættliga ber til at arbeiða í Vágunum, hóast ein býr á Streymoynni, og hetta hevur so havt við sær, at Skipaeftirlitið ikki beinleiðis hevur ført til fólkavøkstur í Miðvági. Av teimum 10 fólkunum, sum arbeiða hjá Skipaeftirlitinum, býr umleið helmingurin í Tórshavn og aðrastaðni í Streymoynni. Óla Hans Hammer Olsen býr sjálvur á Streymnesi, so hjá honum er lítil munur á at koyra til Havnar ella til Miðvágs til arbeiðis. Tað er líka tunnilsgjaldið, men tí slepst ikki undan, sigur hann.






UTTAN ÚR HEIMI

# Óttast høsnavirus í Asia



**Vandin fyri einari nýggjari umfarssótt í Asia er vaksin, eftir at heimsheilsustovnurin hevur váttað, at eitt influensavirus, sum hevur gjørt av við fleiri milliónir høsnarungar, kann smitta fólk**

SÓTT
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

WHO váttaði í gjár, at minst trý fólk í Vietnam eru deyð av einari influansasjúku, sum stavar frá høsnavirusinum. Samstundis hava vietnamesisku heilsumyndugleikarnir kunngjørt, at seinastu fjúrtan dagarnar eru tíggju børn og eitt vaksið fólk deyð av influansu í høvuðsstaðnum Hanoi.

Kanningar hjá WHO hava síðani víst, at tvey av børnunum og ein vaksin maður vóru vorðin smittað høsnavirusinum. Tað er ikki greitt, um hini doyðu av somu orsøk.

Heimsheilsustovnurin sigur, at 1,2 millión høsnarungar eru deyðir av einum influensavirusi. Hetta løgna virusið hevur serliga gjørt um seg har suðuri í Vietnam, og í síðstu viku doyðu fleiri túsund høsn av tí, sigur WHO. Enn er kortini ikki frætt um fólk har suðuri í Vietnam, sum hava fingið smittuna, og heimsheilsustovnurin og teir vietnamesisku myndugleikarnir royna nú at forða fyri, at sjúkan skal breiða seg.

Í Suðurkorea hava heilsumyndugleikarnir váttað, at minst eitt fólk har er smittað av høsnavirusi.

# Danir bygdu granatverksmiðju í Irak

**Júst sum danskir hermenn hava funnið granatir í Irak, ið kanska innihalda eiturevni, er avdúkað, at danskir serfrøðingar bygdu eina granatverksmiðju í Irak, tá landið var í kríggi við Iran**

VÁPNAHANDIL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyri nøkrum døgum síðani frættist, at danskir hermenn vóru komnir fram á nakrar gamlar granatir í einari bygd har eysturi í Irak nærhendis iranska markinum. Eitt ella annað flótandi evni er í granatunum, men tað er ikki greitt, um talan er um eitrandi evni ella ikki.

Í gjár avdúkaði danska blaðið Information, at irakar keyptu eina granatverksmiðju úr Danmark í 1986. Tað var fyritøkan DISA, Dansk Industri Syndikat, sum gjørdi verksmiðjuna, og serfrøðingar hjá fyritøkuni vóru í Irak og settu hana upp vestan fyri Bagdad, skrivaði blaðið.

Richard Guthrie, sum starvast á svenska friðargranskingarstovninum SIPRI, sigur, at granatirnar, sum donsku hermenninir hava funnið, eru gamlar. Tí heldur hann ikki, at tær kunnu takast sum nakað prógv fyri, at Irak hevði hópoyðingarvápn, tá USA og Bretland lupu á landið.

At irakar gjørdu granatir við eiturevnum í áttatiárunum er ikki nakað nýtt. Vesturheimurin visti, at Irak gjørdi og nýtti slík vápn í krígnum ímóti Iran, men tá varð Irak roknað sum eitt sameint land hjá Vesturheiminum í bardaganum ímóti tí víðgongda prestastýrinum í Iran.

Í síðstu viku kom fram, at USA hevur tikið 400 vápnaeftirlitsmenn úr Irak. Eftir at hava leitað í níggju mánaðir hava teir ikki funnið nøkur hópoyðingarvápn.

## Goyma gass í Bretlandi

Næsta ár verður neyðugt hjá bretum at keypa gass úr útlondum, og norska Statoil er eitt av feløgunum, sum liggur framvið.

Statoil hevur í samstarvi við tvey bretsk orkufeløg gjørt av at byggja eina stóra gassgoymslu har suðuri í Onglandi. Goymslan, sum verður undir jørð, skal rúma 420 milliónum rúmmetrum, og hon verður eftir ætlanini klár at taka í nýtslu í 2009. Tó verður roknað við, at tað fyrsta gassið kann sendast hagar ígjøgnum rørleiðingar úr Norðsjónum longu í 2006.

Leiðslan í Statoil vil ikki siga, hvat tann nýggja gassgoymslan fer at kosta. Felagið hevur frammanundan eina gassgoymslu í Týsklandi.

## DNA ímóti neytaøði

Matvørumyndugleikarnir í Danmark ætla nú at nýta DNA-royndir, um illgruni er um, at neyt, sum koma á sláturhúsini, kunnu hava neytaøði.

Sambært Jyllandspostinum eru myndugleikarnir farnir undir at taka DNA-royndir av heilavevnaði hjá eitt nú neytum, og hildið verður, at á hendan hátt fer tað at bera til at staðfesta samleikan hjá tí einstaka djórinum. Hevur eit djór neytaøði, verður tað eisini lættari at finna onnur djór, ið kunnu hava sjúkuna, siga matvørumyndugleikarnir. Djóralæknin Henrik Kreiner sigur við Jyllandspostin, at tann nýggja kanningin er ein fyrimunur, men loysir kortini ikki allar trupulleikarnar við neytaøði.

Higartil hava tólv tilburðir av neytaøði verið í Danmark. Harumframt er sjúkan staðfest hjá trimum djórum, sum hava verið send av landinum. Tann seinasti tilburðurin var í august í fjør, tá tað varð staðfest, at ein kúgv, sum var seld til Portugal, hevði neytaøði. Næstan 3.000 donsk neyt eru avlívað seinastu árini fyri at forða fyri neytaøði.

## Skulu kanna skjøl

Amerikanska fíggjarmálaráðið vil hava at vita, um fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin Paul O'Neill hevur avdúkað loynilig skjøl í einari nýggjari bók, sum júst er komin út, og sum fer illa við George W. Bush, forseta.

Í einari samrøðu við sjónvarpið CBS seinasta sunnudag nevndi Paul O'Neill eitt loyniligt skjal í sambandi við bókina "The Price of Loyalty", sum tíðindamaðurin Ron Suskind hevur skrivað. Tað ljóðar, at fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin gav Ron Suskind umleið 19.000 ymisk skjøl, sum skuldu vísa, hvussu amerikanska stjórnarumsitingin arbeiðir. Í bókini sigur O'Neill millum annað, at George W. Bush, forseti, í veruleikanum hevði lagt ætlanir um at leypa á Irak, áðrenn yvirgangsmenn søktu at USA 11. september í 2001. Tað avsannaðu Hvótu Húsini mánadagin. Talsmaður forsetans segði, at forsetin hevði gjørt alt fyri at loysa Irak-kreppuna á ein friðarligan hátt.

Paul O'Neill var fíggjarmálaráðharri hjá Bush, men hann varð koyrdur frá, tá stjórnin varð umskipað í desember í 2002.

